


# Leygardagin kemur Javni á gátt

## Stuðlið Javna og vinnið ein málning

Leygardagin 27. oktober selja vit Javnaálmanakkan 2008 kring landið. Endamálið við álmanakkanum er at varpa ljós á fólk við menningartarni og at broyta hugburðin til tað at liva og virka við menningartarni.

Hvør mánaður í álmanakkanum hevur eina vangamynd av fólki við menningartarni saman við einum teksti, ið sigur eitthvørt um lívið. Fyri hvønn mánað er eisini eitt listaverk, og tey, sum keypa álmanakkan, hava møguleikan at vinna hesi verk.

Tey, ið málað hava listaverkini í álmanakkanum, eru Ásla Rannvá Svensson, Edward Fuglø, Eyðun av Reyni, Kára Løkin, Frits Johannesen, Bjørg Mohr Anderssen, Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir, Archibald Black, Edith Mørkøre, Jóna Rasmussen, Hedvig Jóhansdóttir og Oggi Lamhauge.




## Javnaálmanakkin kostar 100 kr.

Best er við reiðum peningi, tá ið vit koma. Takið væl ímóti okkum.

REPROZ

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo · javni@javni.fo